# Sterki festivalurin klárur til kapping

**- Vit halda, at kappingin millum festivalarnar er positiv, og vit ætla okkum sanniliga at spíla okkum út næsta summar. Fólk vita, at tey fáa nakað spennandi á Summar Festivalinum, og tey skulu ikki verða vónbrotin næsta ár, sigur Erik Biskopstø, ein av fyrireikarunum av Summar Festivalinum**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fólk í øllum aldri hava seinastu fimm árini leitað sær á Summar Festivalinum. Umleið 35.000 fólk hava verið á festivalinum hesi árini, og fyrireikararnir rokna við stórari fjøld aftur næsta ár*

*Mynd: Bárður Eklund*

Í rúgvuni av festivalum, sum seinastu árini hava bjóðað seg fram kring landið, hevur Summar Festivalurin verið tann drúgvasti av teimum øllum. Familjufestivalurin í Klaksvík hevur havt sera góða undirtøku ár eftir ár, og meðan aðrir festivalar eru komnir og farnir, hevur Summar Festivalurin staðið sum sterki skansin í føroyska summarinum.

Næsta ár bjóða aðrir festivalar seg aftur fram – bæði tann gamli G! og tann nýggi Við Múrin umframt onnur tiltøk – men hetta órógvar ikki fyrireikararnar av Summar Festivalinum.

- Nýggju festivalarnir skulu verða vælkomnir til føroyska summarið. Vit hava altíð hildið, at tá fleiri stór tiltøk verða hildin, styrkja tey hvørt annað, og okkara royndir hava øll árini verið, at vit hava havt sera nógv fólk – eisini tá aðrir stórir festivalar bjóðaðu seg fram, sigur Erik Biskopstø, sum er ein av fyrireikarunum av Summar Festivalinum.

- Vit halda, at kappingin millum festivalarnar er positiv, og vit ætla okkum sanniliga at spíla okkum út næsta summar. Fólk vita, at tey fáa nakað spennandi á Summar Festivalinum, og tey skulu ikki verða vónbrotin næsta ár, sigur hann.

## Lova spennandi bólkar

Summar Festivalurin byrjaði í 2004 við fleiri innandura tiltøkum og eini stórari útikonsert. Umleið 3500 fólk vóru til festivalin, sum eftir eina sera góða byrjan hevur vaksið seg munandi størri. Hesi fimm árini, festivalurin hevur verið hildin, hava verið umleið 35.000 fólk á festivali.

- Tað hevur verið sera hugaligt at merkt, at áhugin fyri Summar Festivalinum hevur verið sera stórur og vaksandi. Og longu kenna vit okkum vísar í, at tað kemur nógv fólk á festivalin næsta ár. Gongd er longu komin á atgongumerkjasølan, og áhugin fyri tiltakinum er sera stórur, sigur Erik Biskopstø.

Summar Festivalurin hevur ikki kunngjørt nakað navn. Onkur søga hevur gingið um, at okkurt stórt útlendskt navn er á veg, men tað vilja fyrireikararnir einki siga um.

- Vit plaga at kunngera fyrsta bólkin nakað eftir ársskiftið, og soleiðis verður eisini í ár. Vit kunnu einki siga um bólkarnar enn, men vit kunnu lova, at fólk fáa eina sera spennandi og fjølbroytta skrá, sigur Erik Biskopstø.




**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** SD 828 **Km:** 69.000
**Árgangur:** 25.11.2003
**Útgjald:** 31.000 **Mðr. gjald:** 2.410 (5 ár)
**kr. 124.000,-**



**TOYOTA YARIS LUNA** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** KE 941 **Km:** 16.418
**Árgangur:** 11.05.2006
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.469 (5 ár)
**kr. 152.000,-**



**MAZDA 626 2.0 BENSIN**
**Skrásetingarnr:** SD 811 **Km:** 85.000
**Árgangur:** 19.12.2001
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.134 (3 ár)
**kr. 85.000,-**



**BMW 320 D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** SB 326 **Km:** 146.000
**Árgangur:** 01.06.2001
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.858 (3 ár)
**kr. 155.000,-**



**MAZDA 6 2.0 BENSIN** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** GF 564 **Km:** 97.000
**Árgangur:** 03.09.2004
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.489 (5 ár)
**kr. 152.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I 4X4** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)
**kr. 235.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL SEDAN** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** BF 715 **Km:** 65.000
**Árgangur:** 04.03.2004
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.533 (5 ár)
**kr. 158.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 H/B AUT.** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)
**kr. 108.000,-**



**COROLLA 2.0 LINEA TERRA D-4D**
**Skrásetingarnr:** HE 038 **Km:** 217.000
**Árgangur:** 07.08.2002
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.151 (3 ár)
**kr. 85.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)
**kr. 198.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F










# NISSAN NAVARA 2.5 DIESEL

Árg. 2005, koyrt 41.500 km. Nýsýnaður, nýlakkeraður. Er sum nýggjur.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 281529**